## DAGSINS MEINING

# Óheppin orðing - men í so avgjørdur floksformaður!

Mitt í eini væltilrættislagdari drotninga- og hjúnprinsavitjan segði drotningin nøkur orð, sum hon helst ikki skuldi havt sagt.Hugsað verður um politiska - ella samfelagsliga - brotið í tí annars frálíku røðuni, hon helt í Norðurlandahúsinum mánakvøldið, tá Føroya landsstýri var vertur.

Tey flestu munnu vera samd um, at orðingin um nýggju skipanina - yvirtøkulógina og heimildarlógina - vóru óheppin, tí semja er ikki um hesa nýskipanina í Føroyum. Tey flestu munnu tó halda, at talan er um eitt framstig, samstundis sum andstøðan heldur, at talan er um eitt afturstig.

Danska kongshúsið hevur verið óheft, og nógv hava stóra virðing fyri danska kongshúsinum, tí tað hevur ikki lagt seg upp í samfelagslig viðurskifti síðani Páskakreppuna í 1920-unum, tá Kristian 10 kongur elvdi til eina politiska kreppu, hóast Joakim Prinsur hevur verið í so langt farmmi við sínum sjónarmiðum um landbúnaðarpolitikkin í ES.

Tað er kent, at danska stjórnin góðkennir røður, sum drotningin skal halda. Nú skulu vit halda okkum frá gitingum, men onkur politikkari hevur róð upp undir, at onkur embætismaður í forsætismálaráðnum hevur skrivað røðuna, og lagt nakrar tulkingar hjá forætismálaráðnum inn í røðuna. Um so er, er tað spell, at forsætismálaráðið misnýtir drotningina, sum stór virðing er um, til slík politisk sneisaørindi.

Hóast nógv harmast um orðingina, yppa vit øksl, og siga tað var so tað, og vit umbera drotningina. Men tað ger formaðurin Tjóðveldisfloksins ikki. Høgni Hoydal boðaði týsdagin frá, at hann sendi avboð til nátturðan umborð á kongaskipinum ígjárkvøldið. Hann "fekk ta pressu", sum hann bað um, vil onkur halda.

Nógv kunnu óivað taka undir við, at hann sum formaður í Tjóðveldisflokkinum mótmælir politisku orðingina í røðuni, um hon verður tulkað til politiska uppílegging. Men haðani og til at senda avboð til ein nátturðabita er eitt í so langt lop, sum summi helst vilja kalla smásinni.

Í øllum førum kunnu vit seta spurnartekin við, um tað er rætt at vera so avgjørdur, tá tað kann hugsast, at tað eru onnur enn sjálv drotningin, sum hava orðað røðuna, hon helt í Norðurlandahúsinum á tí annars frálíka kvøldinum við spennandi konsert konsert og mótasýning og góðum borðhaldi.

Skal mótmælast, skal mótmælast á røttum stað

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

Føroyar í 2015

# Bíðilistar og samstarv

**Bill Justinussen,**
*løgtingsmaður fyri Miðflokkin*



Tað er at fegnast um, at formaður sambandsfloksins so áhaldandi greiðir frá teimum ætlanum, hann hevur í sambandi við at fáa bíðilistarnar til tey føroysku sjúkrahúsini niður. Hetta er ein neyðug ætlan, sum krevur politiska styrki. Eg eri sannførdur um, at føroyska sjúkrahúsverkið kann samskipast betri enn tað verður gjørt ídag. Samstarvið sjúkrahúsanna sínámillum og við kommunulæknarnar kann betrast á fleiri økjum. Verandi støða við vantandi samstarvi ger, at sjúklingurin fær ikki ta tænastu, hann hevur uppiborið. Og Føroya fólk fær ikki nóg mikið fyri skattapeningin, sum verður latin til sjúkrahúsverkið.

### Samstarvsbólkur

Fyri at koma hesum trupulleikum til lívs, setti eg sum landsstýrismaður ein samstarvsbólk við tí endamáli at fáa samstarvið millum tey 3 sjúkrahúsini at virka. Bólkurin, sum m.a. er mannaður við leiðandi umboðum frá teimum 3 sjúkrahús-unum, skuldi á heysti 2003 koma við einum felags tilmæli, men mær vitandi hevur landsstýrismaðurin enn onki tilmæli fingið. Kanska var uppgávan ov stór. Tó burdi nógv verið at rivið í, tí nógv kann gerast betri. Nógv er, sum ein slíkur samstarvsbólkur heilt náttúrliga eigur at kunna semjast um. Eitt nú einfaldar mannagongdir um, hvussu og nær sjúklingar skulu/kunnu sendast frá einum sjúkrahúsi til eitt annað, tá tørvur er á tí. Eitt nú, hvussu samlaða tilfeingi av starvsfólki, útgerð og hølum kann nýtast til fulnar. Eitt nú, hvussu sjúkrahúsverkið kann virka sum EITT verk heldur enn 3 sjálvstøðug sjúkrahús. Endurskoðan av leiðslubygnaðinum var eisini ein av arbeiðssetningunum. Leiðslubygnaðurin er ov stirvin, og tí nýtir serliga leiðslan á landssjúkrahúsinum ov stóran part av sínari orku til at semjast innanhýsis, og fær sostatt minni tíð til átrokandi uppgávur. Alt við sama endamáli: at fáa bíðilistarnar burtur og hækka tænastustøðið, so sjúklingurin veruliga kann siga, at hann fær eina dygdargóða tænastu.

### Brúkarakanning

Sjúkrahúsráðini hava mælt landsstýrismanninum til at gera eina brúkarakanning á teimum føroysku sjúkrahúsunum. Hesum ætlanum kom eg ikki nóg langt við, áðrenn samgongan slitnaði. Men tað er avgjørt neyðugt, at sjúklingarnir sleppa at siga sína erligu meining um, hvussu tey uppliva sjúkrahúsini. Hvussu fóru starvsfólkini við teimum, hvussu eydnaðist viðgerðin, hvussu var tænastan rundan um viðgerðina, hvat manglar og hvat burdi ikki verið. Allar slíkar spurningar haldi eg, at leiðslurnar hava tørv á at seta brúkarunum fyri at kunna gera tænastuna enn betri. Hetta er vanligt aðrastaðni og ein gongd leið at lúka í veltuni.

### Miðflokkurin er fúsur

Tað skal ikki standa á Miðflokkinum at fáa føroyska sjúkrahúsverkið at virka so væl sum gjørligt. Longu nú eru verkætlanir í gongd, sum Miðflokkurin eisini hevur verið við til at borið fram. Serliga er tað talgilda heilsuskipanin, sum er komin væl áleiðis. Vónandi verður hon tað nýtiliga amboð, sum ætlanin er.

# Einskiljingin av Føroya Lívstrygging

**Palli Petersen**



Føroya Lívstrygging, LÍV varð stovnað í 1967 sum ein sjálvsognarstovnur. Líka til tosið um einskiljing byrjaði var støðan hjá LÍV sum sjálvsognarstovni rættuliga greið, nevniliga at arbeiða fyri at tryggja tryggingartakarunum størst møguligt avkast.

Einskiljingin, sum tað nú hevur verið arbeitt við í longri tíð, reisir nógvar ivaspurningar:

… Hví skal Landskassin, sum ikki hevur goldið eina krónu til LÍV, fáa ágóðan av eini einskiljing. Hevði tað ikki verið rættari, at ein einskiljing kom okkum tryggingartakarum til góðar. Vit hava gjørt avtalu við LÍV í teirri trúgv, at LÍV var ein sjálvsognarstovnur hvørs avkast fall til okkum sum tryggingartakarar, og vit hava staðið fyri øllum inngjøldunum.

… Ein møguligur komandi eigari av LÍV vil hava fyri eyga at fáa sum mest avkast av síni íløgu - hetta kann einans koma frá virkseminum hjá LÍV - tað merkir minni bonus til tryggingartakarnar.

… Ein stovnur sum LÍV eigur at hava stóran týdning fyri føroyska samfelagið sum ein strategiskur íleggjari, serliga aktuelt nú ein partabrævamarknaður er við at taka seg upp. Hetta er deils týdningarmikið fyri okkara samfelag, og royndir vísa eisini, at íløgur í partabrøv gjørdar við passandi spjaðing við tíðini geva størri vinning enn tær tryggu íløgurnar í lánsbrøv - Men partabrøv innihalda eisini vága, og tá LÍV skal kunna garantera tryggingartakarunum tað, sum teir hava krav uppá, so er neyðugt við tøkum peningi í tiltaksgrunnum, hesin kemur frá vinninginum, sum LÍV hevur. Men hvat um vinningsbýti fer við bróðurpartinum av tí, sum kundi farið í tiltaksgrunn - so verða møguleikarnir hjá LÍV til íløgur í partabrøv rættuliga avmarkaðir.

Uppsparing til eftirløn er ein langtíðarætlan, har tað er ómetaliga umráðandi at rentan er so høg sum gjørligt. Um vit td. ímynda okkum eina 40 ára uppsparing við føstum árligum inngjaldi og samanbera úrslitið við eina rentu, ið er 5,5 % í mun til 4,5 %, so vil hetta eina prosentið í rentu geva heili 28 % hægri uppsparing í tíðarskeiðinum.

Eftir einskiljingina verður aðalendamálið hjá LÍV, sum eyðvitað er, at geva partaeigarunum mest møguligan vinning, og stríðir hetta móti áhugamálunum hjá tryggingartakarunum.

Ein máti at loyst hetta áhugamálsstríðið var at einskilt Føroya Lívstrygging 100 % til tryggingartakarnar, sum hava áhuga í, at vinningurin hjá LÍV verður brúktur til at styrkja um felagið. Hetta kundi verið gjørt við at skipa LÍV sum eitt sínámillum felag við umboðsráði og nevnd, valda av tryggingartakarunum. Hetta vildi eisini tryggjað tryggingartakaran innlit og ávirkan.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.